gult2 cyan2 magenta2 svart2

Fara aftur at grava í toftunum

Fólk frá Føroya Fornminnissavni fyrireika nú endaligan útgrevstur av økinum niðri í Toftum í Klaksvík. Gomul búseting liggur har

FORNMINNI
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Mánadagin fóru fólk frá Føroya Fornminnissavni undir fyrireikingarnar til nýggjan útgrevstur niðri í Toftum á Borðoyavík.

Anna Katrin Matras og Hákun Andreasen skulu komandi dagarnar gera økið klárt, so endaligur útgrevstur av økinum kann byrja 1. juni.

– Vit hava sett tríggjar mánaðir av til at gera útgrevsturin í Toftum lidnan, sigur Anna Katrin Matras, sum hevur fakligu ábyrgdina av útgrevstrinum.

– Vit eru sera spent at fara í gongd við hetta arbeiðið. Vit vóna at finna at okkurt spennandi og fáa okkurt nýtt at vita um slíka búseting.

Meira enn 30 ár

Fornfrøðisliga arbeiðið í Toftum á Borðoyavík byrjaði í 1969 og helt í fyrstu syftu fram til 1972. Síðani varð einki gjørt fyrr enn í 1989 og 1990. Og enn einaferð hevur økið ligið ónortið í nógv ár.

Føroya Fornminnissavn hevði ætlanir um at tyrva út yvir útgrevsturin, og harvið gera enda á rannsóknunum í økinum. Hetta mótmælti Norðoya Fornminnafelag, og eftir prát millum partarnar endaði tað við, at ætlanir vórðu lagdar um at gera útgrevsturin lidnan.

Og nú verður hol sett á hetta arbeiðið. Í løtuni eru tað Anna Katrin Matras og Hákun Andreasen, sum gera økið klárt, og tey fáa hjálp frá Norðoya Fornminnasavni.

1. juni kom fleiri fólk uppí leikin, tá sjálvur útgrevsturin byrjar, og tað verður ein donsk kvinna, sum verður grevstrarleiðari.

Ikki gerast í stand

Tað er eitt stórt arbeiði bara at fyrireika økið til útgrevsturin. Plastikdúkur, jørð og steinar eru løgd omaná útgrevsturin fyri at verja hann, og alt hetta skal fáast av vegnum, áðrenn fólk fara í holt við at grava við skeiðum.

Ætlanin er, at eini fýra fólk koma at arbeiða í tríggjar mánaðir við at kanna økið.

– Vit vita ikki rættiliga, hvat vit kunnu vænta okkum at finna í toftunum. Tað hevði verið stuttligt at funnið okkurt frá Víkingatíðini og fingið okkurt nýtt at vita um slíka búseting, men tað ber illa til at siga, at okkurt er meiri spennandi enn annað, sigur Anna Katrin Matras, projektleiðari.

Høvuðsmálið er at staðfesta, hvussu búsetingin hevur verið í hesum økinum, og hvussu gongdin hevur verið gjøgnum tíðina.

Tá hesar rannsóknirnar eru gjørdar, skal tyrvast útyvir aftur. Ætlanin er ikki at gera búsetingina í stand.

Mánadagin fóru fólk frá Føroya Fornminnissavni undir at fyrireika endaligan útgrevstur niðri í Toftum í Klaksvík. Anna Katrin Matras og Hákun Andreasen gjørdu innleiðandi mátingar í økinum mánadagin

Fleiri fornminni í økinum

Tá fólk fara undir at grava í Toftum verður tað við greviskeiðum. Allir lutir, sum verða funnir, skulu setast inn í eina krossskipan, so tað verður dokumenterað, hvar lutirnir eru funnir. Eisini skal skil haldast á, hvussu løgini niður í lendi eru.

Tá ógvusliga regnið var í Klaksvík í fjør, leyp ein á nærindis toftunum, og ein partur av fornminnunum vórðu tikin við til havs.

Fólkini frá Fornminnissavninum halda seg kunna staðfesta, at lendi niðanfyri búsetingina er nógv broytt, síðani fólk búðu har.

Toftirnar á Borðoyavík eru tað elsta fornminni, sum er funnið í Klaksvíkarøkinum, og hildið verður, at fleiri toftir eru har í økinum.

Íbúðarneyðin er størsti trupulleikin hjá menningartarnaðum

– Tey menningartarnaðu hava einki merkt til, at tíðirnar eru vorðnar betri í tí føroyska samfelagnum, og meðan politikarar tosa um metyvirskot, er einki eftir til tey veikastu, sigur formaðurin í Javna, Diana í Puntabyrgi, nú 30 ár eru liðin síðani stovningardagin

JAVNI
Stefan í Skorini

Diana í Puntabyrgi, formaður í Javna, sigur, at størsti trupulleikin hjá menningartarnaðum í dag er bústaðarneyðin
Savnsmynd

Í dag er bústaðarneyð og íbúðarneyð hjá fleiri samfelagsbólkum, men Diana heldur, at tey menningartarnaðu eru ringast stadd, tí eingin menning er farin fram tey seinastu tíggju árini.

– Hjartamálið hjá Javna í dag er, at ein loysn fæst á íbúðartrupulleikanum hjá teimum menningartarnaðu. Eingin betring er farin fram á hesum økinum tey seinastu tíggju árini, og tí má gongd koma á.

Diana heldur ikki, at hesin bólkurin merkir nakað serligt til, at samfelagshjólini mala við fullari ferð, og tað harmast hon stórliga um.

Tað eru nógv, ið hava bíðað í fleiri ár fyri at sleppa inn á sambýli ella stovnar, men eingi pláss eru, staðfestir Diana. Um bæði foreldrini fella frá, so fæst ofta eitt pláss, men annars er tað sera torført.

Onkur hevur búð á umlættingarheimi, ið ikki er ætlað til fastan bústað, í fleiri ár, tí einki annað pláss er. Umstøðurnar hjá fleiri av teimum eru lítið virðiligar, heldur Diana.

– Vit í Javna nýta tað mesta av tíðini til at streingja á at finna eina loysn á bústaðartrupulleikanum hjá okkara menningartarnaðu, sigur Diana í Puntabyrgi.

Javni 30 ár

Tann 14. mai í 1971 varð felagið Javni, landsfelagið teimum evnaveiku at bata, stovnað. Tann dagin fyri tredivu árum síðani fekk táverandi landsstýrismaðurin, Jákup Lindenskov, bræv frá felagnum, har heitt varð á hann um at skipa soleiðis fyri, at tey menningartarnaðu kundu hava ein møguleika at vera verandi í heimlandinum.

– Vit krevja tað sum ein menniskjaligan rætt, at hesum fólkum (teimum menningartarnaðu, blm.) verður tryggjað ein forsvarlig tilvera í heimlandi teirra, og vit biðja tí landsstýrið um at streingja á ríkismyndugleikarnar um, at hetta fyrireikaða mál verður tikið fram og fullført, stendur í brævinum til landsstýrismannin.

Hetta var tað fyrsta tiltakið hjá Javna, og tað eydnaðist felagnum at fáa tey menningartarnaðu heimaftur til Føroyar.

– At tey komu heimaftur til Føroyar, og at tey ikki noyddust av landinum er tað størsta gjøgnumbrotið hjá felagnum Javna síðani stovningardagin, sigur Diana í Puntabyrgi, ið tó ikki var við til at seta felagið á stovn. Hon hevur tó verið virkin í Javna, síðan hon flutti heimaftur við familju í 70-unum, og hon hevur verið formaður nøkur skeið.

Fyrilestrar

Í sambandi við at tredivu ár eru liðin, síðani Javni varð sett á stovn, verður skipað fyri almennum fundi við fyrilestrum í samkomuhøllini á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið klokkan 19.

Røðarar vera Christian P. Dahl, fulltrúði, ið heldur fyrilestur við heitinum “Rættartrygd grundað á lóg og siðvenju”, og Karin Kjølbro sum fyrrverandi leiðari á Andveikraverndini skal halda fyrilestur við heitinum “Hvønn góðan eigur barnið, tá vit eru farin”. Jóannes Hansen verður fundarstjóri.

Formaðurin í Javna vónar, at fólk møta væl upp til fundin. Politikarar hava fingið innbjóðing til tiltakið, og nú tá løgtingsvalið nærkast, kann hugsast at nakrir teirra fara at møta upp.

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 1966, Sp/f FR-INVEST, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 28.02.2001
Nýggj hjánøvn: Sp/f Norðfashion (Sp/f FR-INVEST), Sp/f FO-Invest (Sp/f FR-INVEST) Sp/f Faroe Invest (Sp/f FR-INVEST) og Sp/f Handilsskálin (Sp/f FR-INVEST)
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 28.02.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 250.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Anna Dorthea Petersen, 360 Sandavágur.

Skráseting Føroya tann 10. mai 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 1541, Sp/f Rættarhamar, 490 Strendur.

Viðtøkur broyttar: 02.01.2001.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Christian Súni Ljósá, 490 Strendur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.

Skráseting Føroya tann 10. mai 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2202, Sp/f Bátatænastan, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Alfred Johannesen, Traðarvegur 3, 100 Tórshavn.
Innkomin sum formaður: Birgir Johannesen, Argjavegur 63, 160 Argir.

Skráseting Føroya tann 9. mai 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 1966, Sp/f FR-INVEST, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 28.02.2001
Nýggj hjánøvn: Sp/f Norðfashion (Sp/f FR-INVEST), Sp/f FO-Invest (Sp/f FR-INVEST) Sp/f Faroe Invest (Sp/f FR-INVEST) og Sp/f Handilsskálin (Sp/f FR-INVEST)
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 28.02.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 250.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Anna Dorthea Petersen, 360 Sandavágur.

Skráseting Føroya tann 10. mai 2001

Kristin Balle

Skrásetingar-nr. Sp/f 1966, Sp/f FR-INVEST, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 28.02.2001
Nýggj hjánøvn: Sp/f Norðfashion (Sp/f FR-INVEST), Sp/f FO-Invest (Sp/f FR-INVEST) Sp/f Faroe Invest (Sp/f FR-INVEST) og Sp/f Handilsskálin (Sp/f FR-INVEST)
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 28.02.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 250.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Anna Dorthea Petersen, 360 Sandavágur.

Skráseting Føroya tann 10. mai 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 5, Sp/f Havnar Timburhandil, 100 Tóshavn.

Nevnd:
Innkomin í nevndina: Malan Fosaa, Garðavegur 16, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 10. mai 2001

Kristin Balle